




# Danskt – Ein farin tíð



Val
RÓGVI NYBO
Tjóðveldi
www.tjodveldi.fo/rogvi

Vit eiga at niðurraðfesta læruna av donskum í føroyska skúlanum. Vit eiga heldur at raðfesta enskt hægri. Tíðin er farin frá at danskt er neyðugt amboð hjá føroyingum, til tess at fáa samband við umheimin. Hví verða vit so enn í dag noydd at læra danskt á hægsta stigi? Tað er spill av góðum kreftum og ein avmarking fyri føroyingin!

**Enskt og Danskt býtast um**
Vit liva í dag í einum heimi, har mestsum alt samskifti fer fram á enskum. Almenna heimsmálið er enskt, tøknimálið er enskt og vinnumálið er enskt. Flestu lond í heiminum hava í dag enskt sum teirra sekundera mál. Men vit í Føroyum fylgja ikki hesum rákinum. Vit læra enn í dag danskt á sama stigi sum føroyskt, meðan enskt hevur lægri raðfesting. Hetta er ein avmarking fyri føroyingin og fyri Føroyar sum tjóð. Í mínum eygum er tað eitt stórt spill av góðum kreftum, at hvørt barn og hvør unglingi, ið fer á miðnámsskúla, noyðist at læra danskt á hástigi (A-støði) og fáa gjølla vitan um danska mentan og danska bókmentasøgu. Vit kunnu saktans klára okkum í Danmark við at læra danskt á miðstigi (B-støði). Í dag er næstan ógjørligt hjá vanliga føroyinginum við enskum á B-stigi, at samskifta um teknisk mál við onnur enskttalandi í heiminum. Orðatilfeingið strekkir ikki longri enn til vanligt prát um veður og vind. Og hetta er als ikki nøktandi, um vit skulu gerast ein virkin partur av alheiminum og taka lut í alheimsgerðini. Tí eiga vit at býta um raðfestingina av donskum og enskum í føroyska fólkaskúlanum og á miðnámsskúlunum.

**Enskt gevur okkum fleiri møguleikar**
Samstundis sum vit við donskum, á sama støði sum við enskum í dag, høvdu varðveitt eitt tætt tilknýti og góðar samskiftismøguleikar við hini Skandinavisku londini, so høvdu vit við gjøllum kunnleika í enskum opnað nýggjar dyr til umheimin. Við enskum á hægsta stigi, ber til hjá føroyingum at samskifta flótandi við allan heimin, meðan danskt bert gevur atgongd til eina promillu av øllum heiminum. Við enskum á hægsta stigi, opna vit eisini dyrnar til allan heimin fyri víðari lesnaði. Og henda breiða vitanin, sum vit longu nú royna at fáa við serstudningsskipanum til lesandi uttanfyri Danmark, fer at koma føroyska samfelagnum og serliga føroysku vinnuni sera væl við. Tað hevði givið eitt stórt fjølbroytni av vitan í føroyska samfelagnum og vinnulívinum. Um eg skal taka eitt dømi, um hvønn mun gjøllur kunnleiki í enskum ger fyri eitt land, so kann eg taka India. Indiski búskapurin boomar í dag. Ein stórur partur av allari outsourcing í heiminum í dag gongur til India. Orsøkin er miðvísa íløgan hjá India í útbúgving og granskning, og teirra gjølli kunnleiki í enskum. Førleikin í enskum er ein fortreyt fyri vøkstrinum, ið fer fram har. Við enskum samskifta og handla teir við allan heimin í dag, uttan nakrar sum helst trupulleikar.

**Noyðast at fanga altjóða rákið**
Tí noyðast vit at fanga rákið í heiminum, og ikki altíð ganga øvugtan veg. Vit eiga at arbeiða okkum burturúr hesi leivdini frá gomlu kolonistøðuni, sum Føroyar eru í. Men misskilji meg ikki. Talan er ikki um at avskaffa danskt, men heldur um at bróta niður nakrar avmarkingar hjá okkum føroyingum. Vit eiga at gera okkum sjálvum ta tænastu at skapa okkum so góðar møguleikar sum gjørligt. Tað gera vit bert við at læra enskt á hægsta stigi.

# Toskastovnurin á Landgrunninum



Val
SIGMUND ANDREASEN
Miðflokkurin H

Øll eru vit vitandi um at toskurin við Føroyar er illa fyri, Hjálti í Jakupsstovu stjóri á Fiskirannsóknarstovuni heldur at vit ikki hava duga nóg væl at vart toskastovnin, og gevið eg honum rætt í tí, flotin á landloyðini er alt ov stórur.

Hvør er skild í at flotin er so stórur? Sjálvandi teir sum stýra og smíða lóðir, landleiðin skuldi bara verið til útróðraflotan, og smábátar, fyri opnar bátarnir skuldi verið frítt at fiska, tað hevði kanska verið við til at okkara bátabyggjarar kundi varveitt tann Føroyska bátin. Línuflotin skuldi fungi rættindir at endurníggja seg til stór Fristulínuskip, og sjálvandi kvotur í Bartentshavinum, russiskum øki, við Ísland, Grønland, New Foundland og alla staðni har vit kunnu koma, vit hava onki skip sum kann royna á djúpum vatni, eg veit at tað finnist lønandi vinna á hesum økjum, allir fongurin skuldi verið førdir heim til landið at virka, tá kundi man tosa um ogn Føroya fólks.

Ein stórur vandi er svartkjaftaveiðan við Føroyar, har skuldi og má setast eitt mark fyri hvar tey skipini skullu fiska, tað kann gerðast við at nokta teimum at fiska inn á landgrunnin sum teir gerða í dag, við tí resultati at 100 tals tons av toski, hýsu og upsa vera dripin í meskinum av teimum stóru svartkjaftatrolinum, vakni aðrenn ovseint verur, minnist til svartkjafturin er føði hjá fleiri fiskasløgum, og sjálvandi í sinum jakstran eftir føði koma hesi fiskasløg í svartkjaftafelluna, mítt boð er minumum 300 favnar helst 400 favna dýbið so okkurt verur eftir til komandi ættarlið, vel miðflokkin og vit vilja gerða okkara til at fiskiríkidømi kann halda á fram og vera ogn Føroya fólks.
**Gott val.**

---

# At lesa er lykilin



Val
JÓNLEIF JOHANNESEN
valevni hjá Javnaðarflokkinum

Ein grundleggjandi trupulleiki í fólkaskúlanum í dag er, at alt ov nógvir næmingar ikki læra at lesa. Hesum vil Javnaðarflokkurin koma til lívs.

**4. flokkur er markið**
Tá næmingar byrja í fjórða flokki væntar skúlaskipanin, at næmingurin megnar at lesa og skilja læ̈ttar tekstir. Tá gongur skúlaskipanin útfrá, at næmingar klára at loysa lesistykkir í rokning, klára at lesa og svara skrivtligum søguspurningum, klára at fremja mannagongdir í náttúr og tøkni osv. Alt ov nógvir næmingar megna ikki hesa uppgávur og koma tískil at dragna á øllum økjum.

**Meiri lesing í 1. , 2. og 3. flokki**
Lesingin eigur at fáa nógv størri pláss í yngru flokkunum. Her aftrat eiga lærarar í føroyska fólkaskúlanum at fáa betri møguleikar at hjálpa næmingum, sum læra á ørvísi hátt enn fjøldin. Her til er at siga, at ov langt er millum lærarin og serkunnleikan í dag.

**Serkunnlekin**
Vit mugu fáa serkunnleikan nógv tættari knýttan at teimum yngru flokkunum. Megna vit hetta, er møguleikin at fremja eina góða undirvísing nógv størri. Teir fáu næmingarnir, sum tá krevja serhjálp eftir triðja flokk, verða so fáir í tali, at teir koma at fáa góða og væl tilrættislagda undirvísing innan skúlans gátt.

---

# Hvussa fáa vit trivna og fólkavøkstur?



Val
KITTY MAY ELLEFSEN
Fólkaflokkurin

Í seinastuni hava vit sæð hagtøl fyri, hvussu kynsbýtið millum kynini vísir, at serliga útbúnar kvinnur ikki koma aftur til Føroya eftir loknan lesnað.

Tað eru óivað fleiri viðurskifti, ið gera seg galdandi; men eg skal serliga nevna tvey viðurskifti, ið vit kunnu gera nakað við.

Fyrst mugu vit skapa eitt samfelag, ið er spennandi og áhugavert hjá útbúnum fólki at virka og liva í. Hetta gera vit við at raðfesta okkara útbúgvingarkervi soleiðis, at m.a. hægri útbúgvingar kunnu takast í Føroyum á einum føroyskum universiteti. Uppskriftin er ikki serliga torfør – vit kunnu bert hyggja at, hvussu Ísland hevur skipað sítt granskingar- og undirvísingarumhvørvi – og har eru óivað fleiri viðurskifti, vit kunnu læra av. Vit mugu ásanna, at um vit skulu fasthalda mest møguligt av vitanartilfeinginum her í Føroyum, so skal umhvørvi vera til tess.

Og her er ikki spurningurin hvat tað kostar, – vit hava snøgt sagt ikki ráð til at lata vera.

Eitt annað, sum vit kanska sjáldan geva okkum far um, er, at korini hjá støkum uppihaldarum í Føroyum eru sera vánalig. Og sum tíðirnar eru í samfelagnum í dag, so eru lutfalsliga nógv ung fólk stakir uppihaldarar eitt ávíst tíðarskeið. Tey, sum kenna til lestrarlívið í t.d. Danmark, vita fulvæl, at stórur partur av teimum ungu føroyingunum, sum flyta til Danmarkar fyri at fáa sær hægri útbúgvingar, eru stakir uppihaldarar og nógv av hesum fara av landinum, – kanska ikki í fyrstu syftu fyri at lesa, – men tí livikorini eru so vánalig í Føroyum, sammett við Danmark.

Tí er eisini umráðandi, at vit ikki bara raðfesta sjálvar útbúgvingarstovnarnar; men eisini geva okkum far um, at tey ungu mugu hava fíggjarligan møguleika fyri at lesa; eisini ungar stakar mammur við smáum børnum.